


*Úrslitini hjá Rádna hava ikki verið av teimum allarbestu í ár. Seinast bleiv tað tó til eitt fimta pláss, og manningin dylur ikki fyri, at teir droyma um eitt heiðursmerkjapláss á ólavsøku. Mynd: Sunva Ey. Lassen*

# Miðvís framstig dríva verkið

**Kappróðrarbáturin Rádni úr Fuglafirði hevur ikki fingið tey bestu úrslitini í ár. Manningin hevur tó hómað stór framstig seinastu róðrarnar, og tí dríva teir á við góðum hugi. – Ætlanin er at fáa eitt heiðursmerki á ólavsøku, sigur bátsformaðurin**

**KAPPRÓÐUR**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tað er synd at siga, at Fuglafjørður er kendur fyri síni flottu úrslit í kappróðri. Okkurt føroyameistaraheitið er tað blivið til upp ígjøgnum árini, men vit skulu leita langt aftur fyri at finna tað seinasta.

Seinastu árini hava eisini verið sum ein long oyðimarkargongd hjá kappróðrinum í Fuglafirði. Mest sum eingin manning hevur verið við, og tá onkur so hevur tikið seg saman at manna ein av bátunum, so hava úrslitini snøgt sagt ikki verið nóg góð.

Hetta hevur harafturat gjørt, at áhugin í Fuglafirði er vorðin minni og minni fyri kappróðrinum, men nú er ljós at hóma fyri endan av tunlinum.

Kappróðrarfelagið í Fuglafirði hevur tveir bátar við í FM-kappingunum í ár, og serliga 6-mannafarið Rádni hevur tikið seg sera nógv fram seinastu róðrarnar. Vit hava tikið eitt prát við teir tríggjar Sonna, Páll og Kjartan, sum allir rógva við Rádna.

## Rutinan manglar

Manningin umborð á Rádna hevur vant hart upp undir kappingarárið, sum er við at vera liðugt nú. Teir byrjaðu spakuliga at venja í januarmánaði, og í februar byrjaðu teir at venja miðvíst við tí manningini, sum er í bátinum nú.

Sjálvt um teir hava vant so hart, so kann ikki sigast, at teir fingu løn fyri stríðið fyrstu stevnurnar, har teir lógu í botninum.

- Tað var helst sum at fáa ein lítla frammaná, sigur bátsformaðurin umborð á Rádna, Sonni Eliasen.

- Vit høvdu tó spælt okkum við tankan um, at vit kundu enda aftast, og tí vóru vit helst eisini klárir at taka keðiligu byrjanina, sum vit fingu upp á kappingina, við strektum armi, siga teir tríggir.

- Man má endiliga ikki halda, at man fer at vinna, bara tí at man hevur ein nýggjan bát. Rutinan hevur so øgiliga nógv at siga í kappróðri, og taka vit fýra teir fremstu bátarnar hjá 6-mannafønunum, so hava flest allir av monnunum umborð roynt hetta áður, sigur Sonni, og Páll og Kjartan taka undir við honum.

## Miða eftir heiðursmerkjum

Sjálvt um fyrsti róðurin á árinum var einki minni enn ræðuligur hjá Rádna, so gekst betri á næstu stevnu. So við og við gjørdust tíðirnar betri og betri, men Rádni hevði tó ilt við at koma úr botninum. Á seinastu stevnu, sum var Fjarðastevnan á Strondum, bragdaði tó endiliga hjá Rádna. Tá gekst væl hjá teimum at rógva úti á firðinum, og hetta gav teimum at enda eitt fimta pláss og tvey stig í kappingini um meistaraheitið.

Bátsformaðurin dylur heldur ikki fyri, at teir umborð á Rádna droyma um at vinna eitt heiðursmerki á ólavsøku um nakrar dagar.

- Tíðirnar hjá okkum eru batnaðar munandi, og hetta ger, at man blívur nógv spentari. Eg má siga, at málið hjá okkum er at fáa eitt heiðursmerki á ólavsøku. Hyggja vit eftir, hvussu nógv tíðirnar hjá okkum eru bøttar seinastu stevnurnar, so er als ikki óhugsandi, at vit røkka okkara máli, siga teir tríggir, Páll, Sonni og Kjartan.

## Ætla at halda fram

Nú líður kappróðrarárið móti endanum, og flestu av rógvarunum munnu helst síggja spentir fram ímóti ólavsøkuni. Hjá Rádna verður tað kanska til eitt heiðursmerki á ólavsøku, men teir fara neyvan at hótta nakran av ovaru bátunum í samlaðu FM-kappingini.

Hvussu er og ikki, so hevur manningin á Rádna víst sera stór framstig seinastu stevnurnar, og flestu teirra ætla sær eisini at halda fram við kappróðrinum komandi ár.

- Vit hava tosað eitt sindur um at halda fram komandi kappingarár, og eg ivist ikki í, at Rádni fer at blíva mannaður tá. Onkur av okkum skal niður til Danmarkar at lesa í summar, og tí eru vit noyddir at finna onkran nýggjan mann umborð á bátin. Hetta verður tó neyvan nakar trupulleiki, og næsta ár vera vit eitt ár klókari, so tá ætla vit okkum at rógva við um heiðursmerki á hvørjari stevnu, sigur Sonni Eliasen at enda, og hinir báðir taka smílandi undir við honum.

Grundin tykist vera løgd hjá Róðrarfelagnum í Fuglafirði, sum hevur bygt kappróðurin upp um eina miðvísa manning við góðum vónum fyri framtíðina. Hetta verður vónandi byrjanin til eina góða og spennandi tíð hjá kappróðrinum í Fuglafirði.